# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Havnin dystast um finalupláss



B36 og HB skulu dystast í hálvfinaluni í kappingini um Løgmanssteypið. Vinnarin av hálvfinaluni fær útivøll í Havn, tá finalan verður á skránni

**Talan verður um grannauppgerð í Gundadali, tá hálvfinalurnar í kappingini um Løgmanssteypið verða á skránni annan mikudag. B71 og EB/Streymur spæla hina hálvfinaluna**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Lutakast um hálvfinalurnar var í 3-2 sendingini í sjónvarpinum í gjárkvøldið.

B71 og EB/Streymur hittast í aðrari hálvfinaluni, og verður talan soleiðis um tveir dystir á rað hjá hesum báðum feløgum. Dysturin á Sandi millum somu feløg var nevnliga ein av teimum, sum varð útsettur seinasta vikuskiftið.

Hin hálvfinalan verður millum B36 og HB, sum soleiðis skulu spæla tvær grannauppgerðir í Gundadali.

Fyrru hálvfinalurnar skuldu upprunaliga spælast 20. apríl, men flytingar í Formula-deildini hava broytt hetta. Nú eru fyrru hálvfinalurnar fluttar fram til 16. apríl. Seinnu hálvfinalurnar standa framvegis á skránni til 12. mai.

Eisini varð lutur kastaður um, hvør parturin er skrásettur sum heimali, tá finalan verður. Tað gjørdist vinnarin av dystinum millum B71 og EB/Streym.

# Fótbóltssambandið álopið av teldusníkum

**Heimasíðan hjá FSF hevur ligið lamin um vikuskiftið, og FSF heitir á fólk, sum hava verið inni á síðuni seinastu dagarnar, at kanna telduna hjá sær fyri virus**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

- Alt bendir á, at tað var eitt óndsinnað álop frá teldusníkjum, sum var orsøk til, at heimasíða Fótbóltssambandsins ikki var virkin um vikuskiftið og tað mesta av mánadegnum. Fótbóltssambandið skilir, at okkara heimasíða ikki var tann einasta, ið varð álopin í vikuskiftinum, men at fleiri túsund heimasíður vórðu raktar.

Soleiðis skrivar FSF á heimasíðu sínari, sum nú virkar aftur.

- Við hjálp frá Formula.fo er tað nú eydnast at endurskapa heimasíðu okkara, tó at okkurt tilfar er burturblivið. Brúkarar okkara eru vælkomnir at skriva til okkara, ingi@football.fo , um tey koma fram á upplýsingar, ið mangla, so vit kunnu royna at finna tilfarið fram aftur.

- Við tað, at heimasíðan helst eisini hevur verið fongd við telduvirus, sum úrslit av teldusníkjaálopinum, fara vit at ráða øllum teimum, ið hava verið inni á www.football.fo frá fríggjadegnum 4. apríl til fyrrapartin mánadagin 7. apríl, at skanna telduna fyri virus við onkrum av teimum forritum, ið eru til taks til hetta endamál, sigur FSF á heimasíðu sínari.




*Heimasíðan hjá FSF varð um vikuskiftið álopin av teldusníkum*

## Dystirnir avgreiddir um tvær vikur

**Kappingarnevndin hevur gjørt av, at útsettu dystirnir í Formula-deildini skulu spælast 19. og 20. apríl**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað vikuskiftið var annars ætlanin, at hálvfinalurnar í kappingini um Løgmanssteypið skuldu spælast.

Sveinur Tróndarson, formaður í Kappingarnevndini hjá FSF, segði í 3-2 sendingini í Sjónvarpinum í gjárkvøldið, at teir hava gjørt av, at hálvfinalurnar ístaðin verða spældar mikudagin 16. apríl.

Útsetta umfarið í 1. deild noyðist at bíða nakað longur. Har er gjørt av, at dystirnir verða spældir tann 10. mai.

Enn er ikki gjørt av, nær kvinnudystirnir, ið vórðu útsettir um vikuskiftið, skulu spælast.

---

## Viborg spældi javnt

Súni Olsen var ikki við í hópinum, tá Viborg í gjár vitjaði hjá AGF í røttum botngysara í donsku superliguni.

Súni hevur drigist við ein minni skaða, og tí fekk hann ikki spælt í gjár.

Dysturin endaði við málleysum javnleiki, og er Viborg sostatt framvegis seks stig aftan fyri AGF, sum liggur beint oman fyri niðurflytingarstrikuna.

**-mørk**